


Ben Arabo (Mynd: Jógvan H. Gardar)

# Atlantskolvetni selur fyri 166 milliónir krónur

**Ingi Samuelsen**

07.05.2015 - 08:28

Oljan.fo

- Hetta er eitt dømi um, at ein gassfinningur kann geva stórar inntøkur upp á stutt sikt.

Hetta sigur Ben Arabo, stjóri í Atlantskolvetni, sum í morgun kundi boða frá, at felagið við altjóða navninum Atlantic Petroleum hevur selt Pegasus-gassfinningin í Bretlandi fyri 16,5 milliónir pund – 166 milliónir krónur – harav tær 7,5 milliónir pund verða goldnar beinanvegin.

Pegasus West varð funnin í september mánaði í fjør. Brunnurin var royndarframleiddur í november 2014.

Keypari er Third Energy Offsore Limited. Talan er um trý útvinningarøki, P1724, P1727 og P2128, harav Pegasus West gassfinningurin er í tí eina.

Atlantskolvetni eigur 10 prosent í hesum økinum. Fyristøðufelag er Centrica North Sea Gas, sum eigur 55 prosent, meðan Third Energy Offshore Limited, sum nú hevur keypt 10 prosent frá Atlantskolvetni, frammanundan átti 35 prosent.

Sum sagt, so verður ein knappur helmingur av keypskostnaðinum útgoldin beinanvegin, meðan restin verður goldin alt eftir hvat fæst burtur úr keypinum.

Ben Arabo sigur í tíðindaskrivi í morgun, at peningurin frá søluni skal brúkast til at styrkja felagið í hesum tíðum við lágum oljuprísi. Hann vísir tó á, at prísurin prógvar virðið á teimum strategisku íløgunum, sum felagið hevur gjørt.